# Ný Sælandarar vilja samstarva um aling

**Mánamorgunin setti Bjarni Djurholm verkstovuna Open Ocean Aquaculture Engineering á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetur Føroya. Fyri fyrstu ferð eru granskarar úr Ný Sælandi, USA, Noregi, Skotlandi, Íslandi og Føroyum komnir saman fyri tosa um hvussu aliútgerð til harðbalin økir kann mennast víðari, og hvussu eitt altjóða samstarv kann fáast í lag**

GRANSKING
*tíðindaskriv*



Verkstovan er komin í lag, tí tað er ásannað at akademisku umhvørvini, sum arbeiða við at menna aliútgerð, eru smá og fá eisini í altjóða høpi, og neyðugt er við tættum samstarvi innan hetta økið.

Umframt føroyska luttøku, so eru umboð frá U.S. Naval Academy og University of New Hampshire, USA, SINTEF í Noregi, granskingarstovnarnar NIWA og Crawthon í New Zealand, Stirling University í Skotlandi og Háskúla Íslands.

At verkstovan er í Føroyum er úrslit av menning og granskingararbeiði, sum Náttúruvísindadeildin hevur framt saman við stovnum og virkir í Føroyum og uttanlands seinastu árini. Í 1999 byrjaði Náttúruvísindadeildin miðvíst at menna teldumodellir til at simulera sjóvarfalsrákið á landgrunninum, og varð hetta í stóran mun gjørt við atliti til alivinnuna. Í 2002 varð farið undir at kanna, hvussu streymur ávirkar nótirnar í aliringunum í verkætlan. Hetta varð gjørt saman við netavirkinum Vónini og Fiskirannsóknarstovuni við fíggjarligum stuðli úr m .a. Vinnuframagrunninum. Við stuðli frá Statoilsamtakinum byrjaði í 2002 ein PhD-verkætlan, sum hevur til endamáls at menna eitt aldumodel fyri landgrunnin, og í 2003 ein onnur PhD-verkætlan, sum hevur til endamáls at menna útgerð til aling á harðbalnum økjum. Harumframt eru fleiri smærri verkætlanir framdar saman við m. a. p/f East Salmon, Vónin, p/f Gulin og p/f Fiskaaling.

PhD-verkætlanin, sum Øystein Patursson ger, verður framd í tøttum samstarvi við the Open Ocean Aquaculture Programme við University of New Hampshire í USA og Náttúruvísindadeildina. Gjøgnum hetta samstarv er samband fingið við aðrar stovnar kring heimin. Eitt av endamálunum við verkstovuni er menna eitt altjóða granskaranetverk, sum fokuserar upp á avbjóðingirnar, sum eru við at flyta alivirksemi út á harðbalin økir umframt at menna skráir til at útbúgva fólk til henda partin av vinnuni.

Mánadagin vóru framløgur, týsdagin varð vitjað á støðunum hjá Fiskaaling við Áir og í Nesvík og eisini hjá Vónini og Havsbrún í Fuglafirði. Mikudagin verða framløgur, tjak og niðurstøður verða skrivaðar.

Fíggjarligur stuðul til verkstovuna er latin av Norður Atlants Samstarv (NORA) og av oljufelaginum Amerada Hess, umframt frá luttakandi stovnunum.

# Bilførarin var edrúur

Sunnukvøldið vóru fýra ungir mans úr Fuglafirði ávegis til Vestmanna, har teir høvdu einihvørji ørindi.

Komnir oman í Gassadali, har eitt rættiliga knapt sving er, hevur bilførarin snarað heldur knappliga. Úrslitið var, at endin á bilinum kom at taka í bilverjuna, soleiðis sum myndin vísir.

Ein bilførari, sum kom har framvið, boðaði løgregluni frá óhappinum. Seinni varð so blóðroynd tikin.

Ein av teimum fýra monnunum, sum var við bilinum, sigur við Sosialin, at tveir teirra vóru ódruknir – og at annar teirra var bilførarin!

**sb.**


